# Nýggi Stapin fekk stórfingna móttøku




*Nýggi Stapin hevur júst lagt til bryggju á Toftum, og nógv fólk eru á veg at taka ímóti*




*Julius var ein teirra, sum tók ímóti nýggja Stapanum týskvøldið. Navnið, Gandi, á skipssíðuni, verður broytt til Stapin*



*Reiðarin, Anfinn Olsen, takkaði fyri stórfingnu móttøkuna, sum nýggi Stapin hevði fingið*



*- Vit gleðast yvir, at menninir aftanfyri P/F Regn hava áræði og dirvi at fáa sær størri og meira tíðarhóskandi skip fyri gamla Stapan, segði bygdaráðsformaðurin, Marjun Gaardbo.*

**Marjun Gaardbo, bygdaráðsformaður, segði, at tá ið tann fyrsti Stapin kom, var eitt flakavirki í bygdini, sum keypti fisk frá skipunum.**
**- Í dag hava vit fleiri virkir og uppboðssølu, har einum og hvørjum stendur frítt at keypa. Fiskur verður nú koyrdur av Toftum og út til meginpartin av landinum**

MÓTTØKA
*Orð og myndir: Vilmund Jacobsen*

Nógv fólk var samankomið á bryggjun niðanfyri Kassamiðstøðina á Toftum um 18-tíðina týskvøldið, tá ið nýggja línuskipið hjá toftamonnum, Stapin, legði til bryggju. Skipið fekk eina stórfingnað móttøku við bæði sangi og røðum, sum settu dám á hesa løtu nú um heystjavndøgur. Børnini hildu seg heldur ikki aftur, men vóru nógv í tali og bíðaðu saman við teimum vaksnu spent eftir at sleppa umborð at síggja stásiliga skipið.

Bygdaráðsformaðurin í Nes kommunu, Marjun Gaardbo, ynskti vegna kommununa skipinum vælkomnum til bygdina.

Hon segði, at í ár eru 33 ár liðin, síðan gamli Stapin, sum hin fyrsti við hesum navn, kom til bygdina.

- Hetta skip hevur øll hesi árini verið við til at myndað okkara línuskipaflota, sum í dag man teljast millum teir frægastu í landinum.

Hon legði dent á, at uttan skipaflotan og tey arbeiðsfólk, sum hava tilknýti til fiskivinnuna, bæði á sjógvi og landi, var Nes kommuna neyvan tað, hon er í dag.

- Hetta er ein kommuna í menning, sum telist millum fremstu fiskivinnubygdir í landinum, bæði hvat viðvíkur tali av fiskiførum, stórum og smáum og ymiskum veiðihættum, eitt nú útróðrarbátum, línubátum og trolbátum. Sama er galdandi á landi við fiskavirkjum og øðrum virkjum.

Marjun segði, at við skipum, virkjum og øðrum arbeiðsplássum í kommununi, kann sigast, at her er arbeiði til allar hendur.

## Áræði og dirvi

- Tá ið vit nú standa her á bryggjuni og taka ímóti nýggja Stapanum, gleðast vit yvir, at menninir aftan fyri P/F Regn, ið eiga skipið, hava áræði og dirvi at fáa til vega eitt størri og meira tíðarhóskandi skip fyri gamla Stapan.

Bygdaráðsformaðurin vísti á, at tá ið tann fyrsti Stapin kom, var eitt flakavirki í bygdini, sum keypti fisk frá skipunum.

- Í dag hava vit fleiri virkir og uppboðssølu, har einum og hvørjum stendur frítt at keypa. Fiskur verður nú koyrdur av Toftum og út til meginpartin av landinum. Vit gleðast yvir ta menning, sum hevur verið, bæði á sjógvi og landi.

At enda ynskti Marjun Gaardbo P/F Regn hjartaliga tillukku og góða eydnu við nýggja Stapanum.

- Tað er okkara vón, at hann, sum øllum valdar, heldur hond sína yvir skipi og manning, segði bygdaráðsformaðurin.

## Bjóðaði umborð

Eftir at ein sangur varð sungin aftrat á bryggjuni, segði Anfinn Olsen, reiðari, nøkur fá orð.

Hann takkaði fyri stórfingnu móttøkuna, sum skipið hevði fingið og vísti á, at hetta var eitt størri og dýrari skip enn gamli Stapin. Men við tí fiskiskapi, sum verið hevur og teimum prísum, sum fáast fyri fiskin - umframt tí góða og raska fólki, sum hevur tænt reiðarínum so væl , vónaði hann, at raksturin av skipinum fer at hanga saman.

Anfinn Olsen segði, at øll vóru vælkomin umborð at síggja skipið, tá ið móttøkan var liðug, men legði eina við, at fólk turkaðu sær væl um føturnar, tá ið tey stigu inn í tey betru rúmini umborð.

Hetta seinasta lýsir, at hugburðurin seinastu árini er nógv broyttur, og at reiðaríini gera meira burtur úr í dag, at manningarviðurskiftini eru góð og tíðarhóskandi.

Tá ið reiðarin enn einaferð hevði takkað fyri móttøkuna, tusti hópur av børnum umborð og aftaná teimum tey vaksnu, sum sjálvsagt eisini vildu síggja nýggjasta línuskipið í bygdini.



# Fíggjarlógaruppskotið er órealistiskt

**Andstøðan heldur lítið um uppskotið til fíggjarlóg fyri næsta ár og skýrir uppskotið at vera órealistiskt. Fleiri útreiðslur eru als ikki tiknar við í uppskotið, og tí verður stórt hall á fíggjarlógini, tá saman um kemur, siga Sambandsflokkurin og Javnaðarflokkurin, sum als einki álit hava á, at landsstýrið megnar at spara tær 50 milliónirnar, sum skulu veitast í skattalætta næsta ár. Skal skatturin niður næsta ár, verður tað við pengum úr Landsbankanum, eru flokkarnir samdir um**



*- Tað eru fleiri tekin í høvuðsvinnuni, sum benda á, at vøksturin er við at steðga, og tí meti eg, at inntøkurnar eru mettar ov høgt, sigur Alfred Olsen*



*- Samgongan hevur sett sær fyri at fremja fleiri yvirtøkur í næstum, men ikki ein króna er sett av til endamálið. Samtíðis sum landsstýrið ætlar at yvirtaka fólkakirkjuna, løgreglu, lógarmál osv. verður als ikki lagt upp fyri hesum í fíggjarlógaruppskotinum fyri næsta ár, sigur Vilhelm Johannesen*

FÍGGJARLÓG
*Jón Brian Hvidtfeldt*

Fíggjarlógaruppskotið hjá Karsten Hansen fær kaldliga móttøku í andstøðuni. Fíggjarlógaruppskotið, sum vísir eitt avlop uppá 150 milliónir krónur, áðrenn 148 milliónir eru goldnar í avdráttum uppá lánið úr danska ríkiskassanum, fer ikki at halda, og tí verður stórt undirskot á fíggjarlógini, tá avtornar, eru Sambandsflokkurin og Javnaðarflokkurin samdir um.

Alfred Olsen, næstformaður í Sambandsflokkinum, vísir harumframt á, at inntøkurnar á fíggjarlógini eru mettar ov høgt.

- Tað eru fleiri tekin í høvuðsvinnuni, sum benda á, at vøksturin er við at steðga, og tí meti eg, at inntøkurnar eru mettar ov høgt, sigur Alfred Olsen. Hann leggur afturat, at hóast inntøkurnar vaksa, av tí at lønirnar sum heild eru farnar upp, so kann væntast, at samlaðu inntøkurnar frá høvuðsvinnuni fara at lækka næsta ár. Tí mælir hann til, at sama tal varð sett á inntøkurnar næsta ár, sum í ár.

Vilhelm Johannesen úr Javnaðarflokkinum, sum eisini er næstformaður í Fíggjarnevndini, er tó ikki heilt samdur við hesum. Hann metir, at inntøkurnar, sum eru settar í fíggjarlógaruppskotið, helst eru á eini leið, kemur einki óvart á. Heldur eru tað útreiðslurnar, sum eru settar alt ov lágt, vísir Vilhelm Johannesen á.

- Samgongan hevur sett sær fyri at fremja fleiri yvirtøkur í næstum, men ikki ein króna er sett av til endamálið. Samtíðis sum landsstýrið ætlar at yvirtaka fólkakirkjuna, løgreglu, lógarmál osv. verður als ikki lagt upp fyri hesum í fíggjarlógaruppskotinum fyri næsta ár, sigur Vilhelm Johannesen.

Báðir andstøðuflokkarnir vísa á, at hóast tað er rætt sum landsstýrismaðurin í fíggjarmálum førir fram, at fíggjarlógin bara tekur hædd fyri teimum útreiðslum, sum eru aktuellar í løtuni, og tí ikki nøkrum útreiðslum, sum væntandi fara at koma seinni, so átti kortini at verið lagt upp fyri hesum útreiðslum. Til dømis við at yvirskotið á fíggjarlógini í minsta lagi skuldi verið so stórt, at pengar vóru til yvirtøkurnar. Men á fíggjarlógini fyri næsta ár er yvirskotið, tá avdráttirnir eru goldnir, bara tvær milliónir, og tí verður neyðugt við eykajáttanum, skulu yvirtøkur fremjast. Til dømis verður tað mett at kosta umleið 13 milliónir, skal fólkakirkjan yvirtakast.

Bæði Javnaðarflokkurin og Sambandsflokkurin vísa á, at í fíggjarlógaruppskotinum eru fleiri útreiðslur als ikki tiknar við.

- Landsstýrið hevur nakrar skyldur, sum als ikki eru tiknar við í fíggjarlógaruppskotið. Millum annað hevur landsstýrið bundið seg til at gera íløgur fyri átta milliónir í havnagerð í Vági, og so seint sum í marts í ár samtykti løgtingið at játta 32,5 milliónir um árið næstu seks árini til Norðoyatunnilin. Hesar játtanir finnast als ikki í fíggjarlógaruppskotinum fyri næsta ár, vísir Alfred Olsen á. Hann sigur seg tó hava skilt, at ætlanin er at finna pengarnar til Norðoyatunnilin av pengum, sum leypa av á játtanum á fíggjarlógini fyri 2002, men tó sigur hann seg yvast í, hvørt meiriluti verður fyri tí.

Vilhelm Johannsen úr Javnaðarflokkinum leggur afturat, at eftir hansara tykki er alt ov lítið sett av til samferðsluhavnina í Suðuroynni, eins og einki er sett av til tunnilsgerð millum Øravík og Hov. Vilhelm Johannsen metir, at sum heild er alt ov lítið sett av til samferðsluøkið.

## Einki uppskot til sparingar

Hóast andstøðuflokkarnir eru samdir um, at yvirskotið á fíggjarlógini fyri næsta ár er alt ov lítið, samtíðis sum útreiðslurnar eru mettar alt ov lágt, so hava teir ikki stórvegis hug at gera viðmerkingar til, hvar sparingar eiga at fremjast. Vilhelm Johannesen vísir á, at tann økta játtanin til almanna- og heilsuverkið er neyðug, og røkkur bara til at vinna innaftur nakað av tí, sum økini eru forsømd síðstu árini. Tí verður trupult, fyri ikki at siga ómøguligt, nú at fara at fremja sparingar á hesum økjum, metir Vilhelm Johannesen.

Vilhelm Johannesen metir, at sum fíggjarliga støðan sær út í løtuni, noyðast vit helst at ásanna, at undirskot verður á fíggjarlógini næsta ár. Eftir at hava havt blaðað ígjøgnum fíggjarlógaruppskotið, tó uttan at hava havt stundir at nærlisið alt uppskotið, dugur hann illa at ímynda sær, hvar sparingar kunnu fremjast.

Alfred Olsen heldur, at sparingar eiga at gerast, men heldur ikki hann dugir at siga, hvat møguliga eigur at verða spart burtur á fíggjarlógini. Tó vísa bæði Sambandsflokkurin og Javnaðarflokkurin á, at almenna umsitingin er vaksin nógv síðstu árini, og har eigur at bera til at spara nakað.

## Skattalættin verður goldin úr Landsbankanum

Andstøðuflokkarnir eru samdir um, at skattalætti eigur at veitast næsta ár. Men flokkarnir duga sera illa at ímynda sær, at landsstýrismenninir megna at spara tær 50 milliónirnar, sum skulu veitast í skattalætta.

- Tað er púra órealistiskt at ímynda sær, at landsstýrismenninir, nú aftan at teir hava fingið sína játtan í fíggjarlógaruppskotinum, skulu hava áhuga í at skerja sítt egna málsøki, og tí vænti eg ikki, at nakað uppskot um sparingar kemur frá landsstýrinum í heyst ella vetur, sigur Alfred Olsen.

Vilhelm Johannesen heldur lítið um mátan, landsstýrismaðurin í fíggjarmálum nýtir í samband við skattalættan, sum samgongan hevur lovað og skrivað undir uppá.

- Tað er eingin logikkur í, at landsstýrismaðurin ein dag játtar nakrar pengar í einum fíggjarlógaruppskoti, fyri síðan at fara út aftur og taka pengarnar innaftur við at fremja sparingar – hetta er tann øvugta mannagongd, sigur Vilhelm Johannesen. Hann leggur afturat, at tað er lítið sannlíkt, at landsstýrismenninir fara at skerja sína egnu játtan, nú fíggjarlógaruppskotið er lagt fram.

Andstøðan er tí samd um, at skattalættin, sum skal veitast næsta ár, verður goldin av gjaldførinum hjá landskassanum, tvs. úr tí, sum stendur í Landsbankanum. Báðir flokkar taka undir við, at neyðugt er at lækka skattin.

- Er einasti møguleiki fyri at veita skattalætta at fara í Landsbankan eftir pengum, so eiga vit at gera tað, sigur Alfred Olsen.

Vilhelm Johannesen tekur eisini undir við at veita skattalætta næsta ár. Hann er ikki so avgjørdur, hvørt tað er rætt at fara í Landsbankan eftir pengunum, men vísir í hesum sambandi á, at tað helst verður neyðugt at fara í Landsbankan eftir pengum kortini, tí hall verður á fíggjarlógini næsta ár, óansæð um skattalætti verður veittur ella ein.

GÓÐIR BRÚKTIR BILAR

**Nissan Almera 1,6 SR** gulur, 3 hurðar, árg. 1996, 89.000 km. **78.000**
**Nissan Almera 2,0 Diesel GX** grønur, 5 hurðar, árg. 1996. **89.000**
**Nissan Almera 2,0 Diesel GX** reyður, 4 hurðar, árg. 1998, 119.000 km. **110.000**
**Nissan Primera 1,6 A/C** reyður, 4 hurðar, árg. 1998, 70.000 km. **125.000**
**Nissan Primera 2,0 SLX** hvítur, 4 hurðar, árg. 1997, 45.000 km. **95.000**
**Peugeot 106 Diesel** bláur, 3 hurðar, árg. 1997, 71.000 km. **65.000**
**Peugeot 306 Diesel** bráur, 5 hurðar, árg. 1996, 134.000 km. **78.000**
**Peugeot 306 DT 1,9** bláur, 4 hurðar, árg. 1997, 150.000 km. **90.000**
**Peugeot 406 ST 1,9 DT** grønur, 4 hurðar, árg. 1998, 77.000 km. **145.000**
**Peugeot 406 ST 2,0 Hdi** vínreyður, 4 hurðar, árg. 1999, 120.000 km. **164.000**
**Peugeot 406 ST 2,1 DT** beige, 4 hurðar, árg. 1997, 136.000 km. **143.000**
**Opel Astra 1,7 DT** bláur, 5 hurðar, árg. 1998, 82.000 km. **78.000**
**Opel Astra 1,6 St. Car** bláur, 5 hurðar, árg. 1993, 116.000 km. **55.000**
**Opel Astra 1,7 DT** brúnur, 4 hurðar, árg. 1996. **75.000**
**Opel Astra 1,6** beige, 4 hurðar, árg. 1997. **78.000**
**Opel Astra 1,6** bláur, 5 hurðar, árg. 1995, 60.000 km. **67.000**
**Opel Astra 1,6 16V** bláur, 4 hurðar, árg. 1999, 30.000 km. **125.000**
**Opel Astra 1,7 DT** vínreyður, 5 hurðar, árg. 1997, 101.000 km. **89.000**
**Opel Astra 1,6 Club Station Car** reyður, 5 hurðar, árg. 1996, 98.000 km. **70.000**
**Opel Astra 1,7 DT** brúnur, 4 hurðar, árg. 1998, 91.000 km. **95.000**

**Gevið gætur: Bilarnir á listanum kunnu verða seldir**
Bilarnir finnast eisini á:
**www.nissan.fo**

P/F Meinhardt Arge
v/ Oyggjarvegin • Postsmoga 3171
110 Tórshavn • Tel. 31 61 61